Føroyskir samurittar á Roskilde festivali:

# Hugurin at hjálpa drívur verkið

Á jóansøku, tann 27. juni, fara 9 føroyingar til Danmarkar á Roskilde festival. Óivað fara nógvir føroyingar á festivalin, men júst hesir 9 hava eina miðvísa ætlan við ferðini. Teir eru virknir innan Reyða Kross sum samurittar og tað er sum slíkir teir fara á festival og ikki sum tónleikafjepparar




*Samurittarnir, avmyndaðir uttan fyri Reyða Kross, longst til vinstu Hans Kristian Joensen*

*Mynd: Finnur Justinussen*

HJÁLPSEMI

*Dagfinn Olsen*

So mangur føroyingur hevur millum ár og dag leitað sær á ein tann størsta tónleikafestivalin á okkara leiðum, nevniliga tann í Roskilde.

Og so verður óivað aftur í ár, tí nógv stór nøvn fara á pall í danska summarhitanum.

Og skuldi onkur føroyingur ikki havt gott av veðurlagsbroytingini, ella hann ella hon hugnar sær nakað ríkiligt, so eru hjálpandi hendur at taka sær av teimum illa fyri komnu. Og kanska eru útrættu hendurnar føroyskar!

### Bara hjálpa

Ein av føroysku samurittunum, Hans Kristian Joensen, sigur, at nøkur av teimum, ið fara avstað, hava verið í leikum áður. Trý teirra vóru eisini á Roskilde í fjør. Nøkur teirra, sum fara í ár, eru júst útlærd sum samurittar.

- Vit fara niður tann 27. juni og tá byrjar festivalurin. Vit fara so á vakt dagin eftir. Vaktirnar eru 8 tímar og tær kunnu vera allar tíðir á samdøgrinum, sigur Hans Kristian Joensen, sum saman við øðrum samurittum hvønn mikudag møtir á fund hjá føroyskum samurittum í hølunum hjá Reyða Krossi í Vágsbotni í Havn.

- Sum samurittur upplivur ein nógv. Har eru stór tjøld, eini 60 fermetrar til støddar. Og nógv er at gera. Kemur ein á børuliðið, so skal ofta rennast langt eftir fólki, sigur Hans Kristian.

Og at tað er mangt og hvat, ið ein sum samurittur kann koma út fyri, er eyðsæð.

- Fólk fáa blørur á føtur, tey traðka á glas ella tey brenna seg. Ofta av sól ella av bálum, ið eru tendrað, tá festivalurin er endaður og so skulu tey sparka ella kanska dansa í eldinum. Eisini eru mong, ið fáa ov nógv av rúsevnum í seg, fáa yvirdosis. Mong royna sterkaru rúsevnini fyri fyrstu ferð á slíkum støðum, greiðir Hans Kristian Joensen frá.

Men tað er bert sum hjálparar, um onkur kemur illa fyri heilsuliga sæð, at samurittarnir hava ein leiklut. Teir hava einki við møguligar ósemjur ella annað at gera.

- Vit bara hjálpa! Illa fyrikomin vera havd til eftirlit, onnur verða send víðari, til dømis til Main. Tað er stóra tjaldið, har tey, ið eru sera illa fyri, enda.

– Tað eru nógv fólk og nógvar lagnur á slíkum stað, sigur roynd samuritturin.

### Sjálvboðið

Og tað er sjálvboðin arbeiðsmegi, tá samurittarnir fara til verka. Tað, ið kemur inn, fer til útgerð.

- Vit gjalda sjálvi ferðaseðilin, men Reyði Krossur stendur so í ár fyri, at vit fáa eina íbúð at halda til í. Tað er hugurin at hjálpa, ið drívur verkið. Og vónleyst er at uppliva konsertirnar, tí tað er hart arbeiði at vera samurittur. Til dømis skulu børuliðini ofta renna langar teinar, sigur Hans Kristian Joensen.

- Tá stóra vanlukkan var á Roskilde festivalinum, vóru føroysku samurittarnir ikki til staðar. Tá høvdu teir valt at vera við til stóru súkklukappingina, ið var, tá brúgvin um Oyrasund lat upp.

Føroysku samurittarnir vóna, at fleiri føroyingar fáa hug at koma við í teirra hjálpararbeiði, tí eisini í Føroyum er úr at gera.

- Tað eru eisini fyrimunir við hesum, tí t.d. havi eg hoyrt, at á baðistøðum í Danmark, sum føroyingar jú ofta vitja, kunnu samurittar fáa uppgávur og so er familjan boðin við, roynir Hans Kristian at siga fyri at lýsa hjálpararbeiði í einum lokkandi ljósi, men ivaleyst er, at ein eldhugur fyri at hjálpa er fyrsta fyritreyt, um ein ætlar sær við.

– Ólavsøkan er fyri framman og vit plaga at vera til staðar, tá t.d. ólavsøkukonsertin er, sigur Hans Kristian, sum er ein teirra, sum lítillátin ger sítt til, at Roskilde festivalurin í ár vónandi fer fram, uttan stórvegis hóvasták.





*Inga Maria Vang saman við mammuni Randi Vang til Hendur og Hugflog seinasta ár*

Inga Maria Vang, sniðgevi:

# Dreymurin er ikki at gerast víðagitin

Inga Maria Vang fylti 26 ár týsdagin. Hon hevur júst lokið útbúgving sum sniðgevi á einum lítlum privatum skúla í Firenze í Italia. Inga Maria sigur, at tann stóri dreymurin er ikki at gerast víðagitin á klædnamarknaðinum. Heldur vil hon skapa eitt mótamerki, sum eyðkennir Føroyar

SAMRØÐA

*Ingrid Bjarnastein*

26 ára gamla havnargentan, Inga Maria Vang, hevur seinastu trý árini slitið sínar skógvar í Firenze í Italia. Har hevur hon gingið á einum privatum skúla innan sniðgeving. Dreymurin hjá Ingu Mariu er ikki at gerast ein víðagitin sniðgevi. Hon hugsar heldur um at skapa eitt mótamerki fyri Føroyar.

– Eg vil heldur gera okkurt, kanska saman við onkrum øðrum, sum eyðkennir Føroyar. At gerast ein víðagitin sniðgevi er ikki týdningarmikið fyri meg, sigur Inga Maria Vang.

Tað, sum Inga Maria leggur seg eftir, er, at blanda bundnar vørur við toy í einum klassiskum stíli við týdningarmiklum smálutum, sum hon sjálv orðar tað. Klæðini eru mest til ung fólk, bæði gentur og dreingir.

– Dámurin er føroyskur. Klæðini eru góð og heit, og eru slitsterk, so tú fært brúkt tey helst upp í fleiri ár.

Framtíðin er ikki avgjørd enn. Inga Maria hugsar um at fara til París, har hon í løtuni roynir at finna útav onkrum skúlum, har hon kann útbúgva seg víðari. Men enn er onki avgjørt.

### Listastevnan 2002

Seinast í juni mánaða kemur Inga Maria aftur til Føroya. Hon skal vera við á Listastevnuni 2002, har hon er bjóðað at verða við. Á Listastevnuni fer hon at vísa tað fram, sum hon hevur gjørt á skúlanum til eina mótaframsýning, sum var í apríl mánaða. Tað verða tilsamans seks sett av klæðum, sum eru bundin, seymað og heklað.

Um skúlan sigur Inga Maria:

– Ein lítil privat skúli, har tað var deiliga avslappandi og nógvir útlendingar. Tað er nógv øðrvísi at ganga í einum slíkum skúla, enn í einum skúla í norðanlondum. Hetta seinasta árið vóru bara tvær italienskar gentur í mínum flokki, og harumframt vóru fólk allastaðni frá.

Tá 26 ára gamla havnargentan fann útav, at sniðgevi var tann leiðin, sum hon skuldi ganga, hugsaði hon um, hvar hon skuldi fara at lesa. Fyrst var tað stóra mótalandið, Frankaríki, ið kom henni til hugs, men so fann hon henda skúlan í Firenze og valdi heldur at fara har, tí Italia er jú eisini eitt mótaland burturav.

– Mær dámar væl Italia sum land, men tað er ikki her, eg ætli mær at búgva restina av lívinum. Fólkini eru sera blíð og vinarlig, men so er eisini nógv kaos og óskil í. Skipanirnar rigga ikki so væl, og tað er ov rokasligt, greiðir Inga Maria frá.

Í frítíðini er nýútbúni sniðgevin saman við fólkum frá skúlanum og teimum, sum hon býr saman við. Hon íðkar ítrótt, men hetta hevur ikki verið nógv tíð til vegna skúlan.

### Hondarbeiði

Inga Maria bæði bindur, seymar, heklar og annað. Í Italia er tað ikki vanligt, at ung fólk binda.

– Tá eg havi verið onkrastaðni, og havi tikið stokkarnar fram, hava fólk bara hugt býtt eftir mær, og spurt, hvat eg geri. So leggja tey afturat, at eg eri ikki so gomul enn, sigur Inga Maria flennandi.

Hon heldur, at hondarbeiðið er kreativt og skapandi og tú kanst fáa nógv burturúr tí. Í Italia duga flest øll ung ikki at binda, men tað er sjálvandi onkur, sum er undantakið.

Tá Inga Maria kemur heim síðst í hesum mánaðinum hopar hon uppá at finna eitt arbeiði. Framtíðarætlanirnar liggja ikki klárar á borðinum, og tí tykist hon at verða opin fyri øllum.

– Eg taki tað bara, sum tað kemur, sigur Inga Maria at enda úr telefonini í vakra, gamla býnum, Firenze í Italia.